## Missiónsvika í Gøtu

Missiónsvikan í Gøtu byrjar týskvøldið kl. 20 í kirkjukjallaranum. Mikukvøldið verður føstugudstænasta, og síðan heldur missiónsvikan fram til og við sunnukvøldið. Á skránni verða talur og góður sangur. Bønarløta verður hálvan tíma áðrenn hvørt møtið, somuleiðis sum tað verður drekkamunnur aftaná hvørt møtið. Frá fríggjakvøldið til sunnukvøld verður barnaansing við bíbliusøgu, sangi og ítriv. Sagt verður, at øll eru hjartaliga vælkomin.



## Terji varð ársins sandingur

Á hugnakvøldi, sum Virkið skipaði fyri leygarkvøldið, fekk ein Terji Dalsgaard eitt stórt herðaklapp frá øllum sandingum. Við sms var møguleikin opin at velja ein sanding, ið hevur útmerkað seg á ein ella annan hátt tann positiva vegin. Við sínum frálíka portali, bkv.fo, hevur Terji gjørt heimin minni. Hvør sandingur, um hann so er í Kina, USA, Porkeri ella á Sandi, hevur møguleikan at fylgja við, hvat hendir heima í Sandoynni. Terji var sera ovfarin, tí sjálvur hevði hann skotið Sólvit Simonsen upp til ársins sanding. Hann sigur um sín portal, at hann ger sítt besta til at dagføra hann og at gera hann so spennandi sum gjørligt. Men hann ynskir eisini, at portalurin einaferð fær ein ungling at skriva á portalin, soleiðis at øll kunnu fáa áhuga fyri at lesa inni á bkv.fo. Terji sang og spældi guitar til hugnakvøldið. Hetta kvøldið var sera væleydnað við góðum undirhaldi og eitt sindur av skemti, ið Pól, Astrid, Eyðbjørg og Heri skipaðu fyri.

# Fá ferðandi tær fyrstu ferðirnar



*Bussførararnir skulu eisini venja seg til nýggju ferðaætlanina. Í morgun lá væl fyri til hetta, nú eingi skúlabørn vóru við*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Vanliga eru bussarnir hjá Bussleiðini nóg stórir teir flestu túrarnar um dagin. Í morgun, nú tann nýggja koyriskipanin varð tikin í nýtslu, vóru teir so at siga fólkatómir.**

BUSSLEIÐIN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Havn:** Eftir at hava roynt við ókeypis koyringini, var tíðin nú komin at víðka um tilboðið enn meiri.

Í morgun byrjaðu bussarnir hjá Bussleiðini soleiðis at koyra tríggjar ferðir um tíman, í mun til tvær ferðir áður. Ein onnur broyting er hon, at ein serstøk Skúlaleið er sett á stovn.

Hetta eru alt stórar broytingar sum miða eftir at geva teim ferðandi eina betri tænastu, soleiðis at ferðslan gjøgnum býin verður so avmarkað sum tilber.

Síðani skipanin við ókeypis koyring varð sett í verk, hava tey í býráðnum staðfest eina rættiliga stóra øking í talinum av ferðandi.

Onnur eru kortini av teirri sannføring, at talið av bilum kortini ikki er minkað í eins stóra mun.

Orsøkin til hetta er helst hon, at talið av arbeiðsfólki og vitjandi í Havn er vaksið um somu tíð, nú bæði fólk í Vágum og Norðoyggjum hava møguleika at sleppa til høvuðsstaðin gjøgnum undirsjóvartunlarnir.

Í dag høvdu skúlabørnini frí í samband við føstulávintina. Seinni í vikuni skal nýggja koyriskipanin standa sína roynd, soleiðis at tann fullkomna koyriætlanin kann setast í verk í komandi viku.

### Tvey ferðandi

Klokkan 9:05 í morgun fór bussurin á Leið 3 úr Steinatúni og út til Norðasta Horn.

Eingin var í bussinum á veg út hagar, men á leiðini sóust fólk bíða í hinari síðuni eftir bussinum, sum var á veg heim í býin. Hesin túrurin var tann, sum tey helst vóru von at nýta í farnu viku.

Hesi vóru kanska helst ikki greið yvir broytingarnar, ið komu í gildi árla í morgun.

Á Norðasta Horni hevði bussførarin ein steðg uppá 12 minuttir, og tá hann gjørdi klárt at fara kl. 9:25, sást ein maður nærkast bussinum og kom innar.

Beint tá bussurin skuldi fara avstað, kom ein genta stórleypandi omaneftir móti steðgiplássinum. Hon hevur helst hildið seg verið í góðari tíð:

Klokkan var jú ikki meiri enn 9:25 og vanliga fer bussurin ikki avstað fyrrenn 10 minuttir seinni. Hon hevði helst ikki varnast, at tann gamla koyriætlanina ikki var galdandi longur.

Hesi bæði vóru sostatt einastu ferðafólkini við Leið 3 heim í Steinatún henda túrin.

### Lítil kunning

Tosað hevur verið um hesar broytingarnar í longri tíð, og nú vórðu tær so umsíðir settar í verk.

Tað skilst tó á fólki, at kunningin um hesar broytingarnar í ferðaætlanini hevur verið rættiliga avmarkað – fyri at siga nærum eingin.

Onkur ferðandi høvdu lisið okkurt smávegis um tað í onkrum blaði, høvdu hoyrt tað í útvarpinum ella lisið tað á Portalinum, men eingin stór lýsingarkampanja hevði boðað frá hesum broytingum.

- Eg fór inn á heimasíðuna hjá býráðnum í morgun fyri at tjekka av, nær bussurin fór. Tað var gott at eg gjørdi tað, tí annars hevði eg verið ov seinur.

- Men tað hevði nokk ikki bilað so nógv, tí nú er ikki so leingi at bíða eftir næsta bussinum, segði ein ferðandi, sum skuldi til arbeiðis klokkan átta í morgun.

Boðað varð somuleiðis frá í tíðindum, at ein faldari var at fáa umborð í bussunum og á øðrum støðum í býnum. Men eingin faldari var at fáa í morgun, og verður neyvan at fáa hesa vikuna.

Sum skilst eru tey í ferð við at eftirmeta ta nýggju rutuna og regulera tíðirnar soleiðis at alt kemur at passa saman. Í hesi vikuni verður alt sett saman í ætlanina, soleiðis at ein fullfíggjað ferðaætlan kann fáast í næstu viku.

Ætlanin er nevniliga at skipa Bussleiðina soleiðis, at bussar bert verða í aðrari síðuni í Steinatúni ísenn, og ikki tveir í hvørjari síðu eins og áður.

Slíkt krevur sjálvandi planlegging, tá tað í støðum bert eru tveir minuttir millum bussarnar, eins og ein skal tað atlit fyri bussunum hjá Bygdaleiðum.

Í dag vóru ikki so nógv fólk við Bussleiðini. Men skjótt verður aftur trongt um sitiplássini í bussunum.



*Fá ferðafólk við bussinum í morgun. Orsøkin er hon, at skúlarnir hava frí í dag*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Broytt ferðaætlan

Bussleiðin koyrdi áður tvær ferðir um tíman, men er nú økt til tríggjar ferðir.

Fyri Leið 3 til dømis merkir hetta, at bussarnir nú fara av Norðasta Horni tjúgunda hvønn minutt – tað er: 05, 25 og 45 – og av Løgmannabreyt 07, 27 og 47.